gult cyan magenta svart



VÍF-VB 32-19 (11-9)

# VÍF skúgva› i VB til viks

**Vónirnar hjá VB um at fylgja vi› í oddinum fingu ein álvarsligan snudd sunnudagin. VÍF var oman á í einum og øllum, og bert stórspæl av Gu›run í Lágabø for›a›i fyri einum rættiligum skrædli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ta› var eitt slag av lagnudysti hjá VB, tá tær leygardagin fóru til Vestmanna at royna seg. Higartil høvdu úrslitini veri› á einari lei›, men tap fyri Stjørnuni og VÍF høvdu avdúka›, at teimum kanska vænta›i ta› seinasta petti›, fyri at kunna gera seg galdandi í toppinum.

Vónirnar undan kappingini vóru annars, at li›i› kundi blanda seg í FM-strí›i›, og skuldi lív haldast í hesum, var ikki rá› til enn eitt tap fyri vestmannagentunum.

## Tungt hjá VB

Ta› gjørdist tó talan um eitt tap, og eftir dystin mundi neyvan vera nakar sum helst ivi um, at ta› var betra li›i›, sum vann.

Bur›urin tóktist alla tí›ina at vera sera tungur hjá VB. Fyrsta máli› fingu tær ikki fyrr nærum tíggju minuttir vóru leiktir av dystinum, og hetta sigur eitt sindur um, hvussu væl vestmannaverjan stó› seg.

Hinvegin so eydna›ist heldur ikki VÍF at skrykkja seg rættiliga leyst hesa fyrstu løtuna, men meira enn naka› anna› var hetta orsaka› av VB-málverjanum, Gu›run í Lágabø.

Fyrsta hálva tíman av dystinum s‡ndi hon veruligt klassaspæl. Ta› kundi nærum gera ta› sama, hvar skotini komu frá, og hvussu fríar VÍF genturnar vóru, tí hon tók sær av tí allarmesta hesa løtuna.

Stórspæl hennara helt í roynd og veru VB inni í dystinum allan fyrra hálvleikin. Spakuliga minka›u tær aftur um VÍF lei›sluna, og tá fari› var› til hálvleiks, hev›i tú varhugan av, at enn hev›i VB eitt or› at skula siga í dystinum.

Umframt at VÍF greitt hev›i taki› á dystinum í fyrra hálvleiki, so var› VB eisini skert rættiliga tí›liga í dystinum, tá Margretha fekk rey›a korti›. Hetta hendi, tá hon óney›uga har›ligt ste›ga›i Ioana Rapa í einum kontraálopi. Heldur sjáldsamt at dómararnir velja at n‡ta rey›a korti› somiki› tí›liga í dystinum, men einki er at ivast í, at avger›in hesum vi›víkjandi var røtt.

## Orkan gekk undan

Einki er heldur at ivast í, at tær hjá VB ætla›u sær at fáa fatur á vestmannagentunum, tá tær komu á vøllin til seinna hálvleik.

Tær byrja›u eisini væl, og fyrstu løtuna sá út til, at veruligur spenningur nú kundi koma í dystin.

Um ta› var orkan ella ikki, skal ikki ver›a gitt um her, men undir øllum umstø›um, so fór VÍF brádliga at renna frá VB.

Gu›run í málinum var nú eisini farin at møast, og í seinna hálvleiki megna›i hon als ikki at halda li›feløgunum inni í dystinum.

Álopsspæli› hjá heimali›num gekk nú vi› fullari fer›. Verjan rigga›i, og hetta gav møguleika fyri hópin av skjótálopum, harav tey flestu vór›u meistarliga sett í gongd av sera neyvu útkøstunum hjá Manuela Stan. Í leikskránni var› tiki› til, at hon helst var› tann málverjin í landinum, sum hevur bestu útkøstini, og hetta man neyvan vera heilt av eini lei›. Onkuntí› hev›i tú nærum varhugan av, at hóast VB verjan var komin upp á pláss, so kundi Manuela spælt strikuna leysa.

## Kann gerast betri

Vi› grei›a sigrinum sta›festu vestmannagenturnar, at dysturin um gulli› ver›ur ímillum tær og Stjørnuna.

Í øllum førum er VB fyri fyrst tveitt úr hesum strí›i, og so er ilt at síggja, hvat anna› li› skal kunna fylgja vi› teimum bá›um fremstu.

Tá hetta er sagt, skal eisini leggjast afturat, at VB li›i› er ført fyri at vísa meira, enn tær gjørdu leygardagin.

Fleiri av teimum leikarum, sum vanliga eru millum berandi kreftirnar á li›num, komu ongantí› í gongd móti VÍF. Sjálvsagt skal VÍF verjan hava naka› av rósi fyri teirra arbei›i, men ta› man vera langt sí›ani, at eitt nú Guri› og Sólrun hava veri› somiki› líti› vi› í einum dysti.

Hetta gjørdi, at alt ov stórur partur av álopsspælinum kom at liggja á her›unum á Reginu Radó, og hóast hon spældi væl, so megna›i hon ikki at lyfta hesa uppgávuna einsamøll.

Hjá VÍF rigga›i spæli› hinvegin nærum optimalt. Li›i› hevur eisini eina gó›a blanding av spælarum, sum allar hava hvør sínar dygdir, og hetta ger, at tær eisini ver›a minni tengdar at, hvussu mótstø›uli›i› velir at skipa verjuspæli›.

Ivaleyst er ta› ov tí›liga at siga naka› um endaligu stø›una enn, men skal dysturin leygardagin n‡tast sum mátistokkur, er einki at ivast í, at ta› ver›ur sera torført hjá Stjørnuni at verja FM-heiti›, sum tær vunnu í fjør.



*Bæ›i Nicolina og Gu›run spældu væl leygardagin, men ta› var munur á, hvussu stóra hjálp tær fngu frá li›feløgunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Ioana Rapa 9(3), Nicolina Ey›bjørnsdóttir 7, Nicoleta Radu 7, Frí›a Marjunardóttir 6, Sóley› Mikkelsen 2, Alis Høghamar 1
VB: Regina Radó 11(5), Ey›britt Krosslá 2, Andrea Lütz 2, Rnnvá Augustinussen 2, Guri› Mortensen 1, Maria Winther 1
Brotskøst: VÍF 6, VB 7
Útvísingar: VÍF 2, VB 3
Diskvalifikatión: VB 1 (beinlei›is reytt)
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Løgdu beinan vegin eina grei›a linju, og syrgdu fyri, at hendan var› hildin allan dystin.



*Jónleif Sólsker heldur, at ta› í løtuni sær sera spennandi út hjá Kyndli*

Kyndil-KÍF 32-19 (17-9)

# Kyndil komi› fyri seg

**Eftir eina laka byrjan tykist Kyndil nú at hava fingi› rættiliga fer› á, og sunnudagin vór›u kollfir›ingar sendir úr kommununi vi› stórtapi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá Kyndil og KÍF seinast hittst, var ta› í einum sera spennandi dysti, sum enda›i vi›, at li›ini fingu eitt stig í part.

Sunnudagin hittust li›ini aftur, men hesu fer› var ongantí› líkt til, at talan skuldi gerast um nakran spennandi dyst.

## Lupu avsta›

Kyndil byrja›i sum óløgi, og á›renn kollfir›ingar høvdu summa› seg so nøkunlunda, vóru longu úti vi› 10 mál á muni millum partarnar.

Sum skilst á vi›haldsfólkunum hjá Kyndli, so hev›i li›i› ein veruliga gó›an dag. Álopsspæli› fleyt, so ta› var ein fragd fyri eyga, og serliga teir bá›ir, Bjarni Wardum og Janus Einar Sørensen s‡ndu, at teir veruliga hoyra heima á A-landsli›i okkara.

Í hálvleikinum vóru áta mál á muni, og hóast Kyndil setti fer›ina naka› ni›ur í seinna hálvleiki, so kom sigur teirra ongantí› í vanda.

Afturvendi spælskiparin hjá Kyndli, Jónleif Sólsker, helt eftir dystin, at teir kundu ikki vera anna› enn nøgdir vi› avirki›.

– Vit fingu eina ótrúliga gó›a byrjan, har vit beinan vegin fingu fatur í verjupartinum, grei›ir hann frá.

– Hetta gjørdi, at vit eisini gjørdust tryggari í álopsspælinum, og kombinatiónirnar hjá okkum í álopspartinum koyrdu til tí›ir sera væl. Har umframt hava vit fyri tí›ina ein sera gó›an málverja, og í dag tók Jens sær av tí allarmesta, sum slapp inn um verjuna.

Um avriki› eisini bo›ar frá, at Kyndil veruliga fer at blanda seg í oddastrí›i›, dugir Jónleif tó ikki at siga.

– Ta› sær í øllum førum sera spennandi út, men vit taka so ein dyst í senn. Hóskvøldi› skulu vit inn á strendur, og ta› ver›ur allar helst ein torførur dystir.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Janus Einar Sørensen 8, Bjarni Wardum 8, Róar Nielsen 4, Heini Bentse 4, Høgni Klein 4(2), Regin M. Petersen 2, Rúni Poulsen 1, Uni Wardum 1
KÍF: Doricia Tomic 6(1), Vagnur Johannesen 5, Suni Davidsen 3, Petur Martin Johansen 2, Finn Heri Johannesen 1, Regin Petsern 1, Kristian Madsen 1
Brotskøst: Kyndil 3, KÍF 2
Útvísingar: Kyndil 3, KÍF 3
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Kristian Martin Skála



VÍF-StÍF 40-27 (18-12)

# VÍF er ikki til at ste›ga

**Dysturin millum VÍF og StÍF var ein av teimum heilt frægu, hvat leikdygd vi›víkur. Hinvegin var ta› so sum so vi› spenninginum, tí til tess vóru vestmenningar alt ov sterkir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ta› vóru tey bæ›i fremstu li›ini í hondbóltskappingini, sum brustu saman, tá StÍF sunnudagin vitja›i í Vestmanna.

VÍF hev›i undan dystinum fult stigatal, og teir vóru eisini favorittar. Ikki minst grunda› á sigurin inni á Skála, tá li›ini bæ›i hittust í fyrra sínamillum dystinum í grundspælinum.

## Bert Ingi fylgdi vi›

Ta› tóktist tó at byrja vi›, sum um strandingar ikki vildu lata sær lynda, at teir aftur her skuldu missa tvey stig.

Teir fingu alt fyri eitt verjuna at rigga. Vi› at verja offensivt royndu teir at halda skjúttunum hjá VÍF burturui, og hesin parturin av spæliætlanini eydna›ist eisini sera væl fyrstu løtuna.

Hev›i ta› ikki veri› fyri Inga Olsen, so høvdu gestirnir helst eisini kunna vunni› sær eina trygga lei›slu hesa fyrstu løtuna, men li›skiparin vildi ta› tó ø›rvísi. Me›an strandingar ansa›u li›feløgunum, skeyt Ingi fimm tey fyrstu VÍF málini, og syrgdi sostatt fyri, at StÍF ikki slapp frá mótstø›uni.

So vi› og vi› fekk VÍF tó fatur í rætta endanum. Verjuspæli› gekk nú betri. Hetta vi›førdi, at kontraálop eisini kundu setast í gongd, og so smátt kundi ein hóma, at ta› helst mundi fara at enda vi› einum heimasigri, hóast bragdligu byrjanina hjá StÍF.

## Rulla›u seg út

Seianstu løtuna av fyrra hálvleiki fekk heimali›i› veruliga fer› á, og eftir hetta var ta› í roynd og veru bert ein vegur.

Fyrra partin av seinna hálvleiki hildu teir fram vi› sama skjóta og ágangandi álopsspælinum, og eina løtu var vandi fyri, at talan vór at gerast um eina sanna ni›urger›in av gestunum. Verjan rigga›i at kalla optimalt, og hetta vi›førdi eisini, at hópurin av kontraálopum kundu setast í gongd, og Johan Danielsen kundi millum líti› og einki gera, tá bæ›i ein og tveir mótstø›umenn komu einsamallir rennandi oman máli hansara.

Avriki› hjá VÍF hesa løtuna sta›festi enn einafer›, at teir í løtuni eru klárt sterkasta li›i› í kappingini, og ta› kann tykjast sera torført at síggja, hvør kann ste›ga sigursgongd teirra. Eisini tí breiddin í hópinum er somiki› stór, at ta› at kalla er ógjørligt hjá mótstø›uli›num at leggja eina haldgó›a spæliætlan undan dystinum.

Hesu fer› var ta› Ingi, sum rættiliga var í essinum, men ta› kann væl vera, at ta› komandi dystin ver›ur onkur av hinum leikarunum, sum tá tekur yvir. Áki, Martin, John og Sámal, fyri at nevna nakrar, kunnu allir at kalla avgera ein dyst einsamallir, og ta› ber sjálvandi ikki til hjá mótstø›uli›num at seta allar hesar út av spælinnum samstundis.

## Ov dey›ir í løtum

At VÍF tykist vera somiki› einará›andi í kappingini, merkir ivaleyst, at allur spenningur um gullmerkini nú má metast at vera fokin.

Um hini hei›ursmerkini er talan tó enn um knallhar›a kapping, og eru ta› serliga StÍF og Kyndil, sum eru partarnir í hesum strí›num. Komandi dystin skulu strandingar taka ímóti júst Kyndli, og hóast grei›a tapi› sunnudagin, so eiga teir at finna nógv positivt í avrikinum móti VÍF.

Til tí›ir var talan um heilt gott hondbóltsspæl, og serliga í álopspartinum vóru fleiri fer›ir flottar kombinatiónir at síggja. Dystinum vænta›i tó tann spenning, sum ofta er nóg stórt undirhald í sær sjálvum.

Eisini telur ta› upp eftir hjá strandingum, at tær aftur tykjast at hava funni› ein rættan strikuspælara. Poli Hansen røkti í øllum føurm óvandu uppgávuna stak væl. Rokmikil, sum hann er, fær mótstø›an ongantí› fri› fyri honum, og aloftast sótu skotini væl, tá hann slapp framat.

Ta› tykist tó, sum um strandingar hava ov nógvar »dey›ar« løtur í dystinum, og hetta er avgjørt naka›, sum eigur at betrast, um teir veruliga skulu gera seg galdandi.

Møguliga er ta› ein spurningnur um orku, men undir øllum umstø›um tóktist leikararnir í fleiri førum ikki nóg hugsavna›ir um uppgávuna, og móti einum li›i sum VÍF ver›ur hetta so dyggiliga revsa›.



*Á myndini hava strandingar endiliga fingi› fatur á Inga Olsen, men megin partin av tí›ini var Ingi ikki til at ste›ga*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Ingi Olsen 13, Johnny Joensen 7, Sámal Joensen 6, Áki Olsen 5, Martin Hummeland 5, Harald Bjørgvin 2, John Zachariasen
StÍF: Artur Johansen 9(4), Costi Dumitrescu 6, Poli Hansen 5, Andre F. Danielsen 3, Marius Joensen 2, Leivur Justinussen 1, Alexandur Johansen 1
Brotskøst: StÍF 4
Útvísingar: VÍF 4, StÍF 3
Dómarar úr Tjaldur: Dánjal Hansen og Kári Hansen. St‡rdu dystinum væl, men tóktust til tí›ir heldur ivingarsamir.

Tjaldur-H71 25-21 (10-6)

# Tjaldur er fari› á flog



*Olaf Vestergaard var als ikki nøgdur vi› avriki› sunnudagin: - Vit høvdu ein ringan dag.*

**Vi›ráki í Runavíkini heldur fram, og sunnudagin fekk Tjaldur aftur tvey stig, tá H71 var á vitjan**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at taka seg aftur í, at runavíkingar eru sum hamskiftir teir seinastu dystirnar.

Frá at hava fingi› bank oman á bank, hevur li›i nú ment seg sera nógv, og ver›ur hildi› fast vi› hetta, tykist ikki at vera nakar ni›urflytingarvandi hetta kappingarári›.

Sunnudagin vóru hoyvíkingar á vitjan, og aftur eydna›ist ta› Tjaldur at vinna sær tvey stig. Tvey stig, sum samstundis lyftu felagi› av aftasta sessinum, har teir annars hava hildi› til stóran part av árinum.

Longu frá byrjan var Tjaldur omaná, og hóast tali› av málum ikki var hitt heilt stóra, so var ta› tó nóg miki› til at halda hoyvíkingarnar aftan fyri.

Teir fingu nevnliga bert seks mál teir fyrstu 30 minuttirnar, og hóast teir í seinna hálvleiki komu betri vi›, so hjálpti líti›.

Mundurin í málum var alla tí›ina hampuliga stórur, og veruligur spenningur kom ongantí› í dystin.

## Ringur dagur

Olaf Vestergaard, sum í mong ár hevur veri› á besta li›num hjá H71, helt eftir tapi›, at talan hev›i veri› um ein ringan dag hjá teimum.

– Hatta var bara ein av teimum døgunum, har einki rigga›i. Vit spældu ikki nóg væl, og harumframt brendu vit eisini fleiri gó›ar møguleikar, sjálvt um málverjin hjá teimum eisini skal hava rós fyri hetta.

– Í verjupartinum gekst okkum hampuligt, men í álopspartinum bar einki til. Seks mál í einum hálvleiki siga eisini naka› um, hvussu illa ta› lá fyri, so har er einki at tosa um.

– Annar heldur Olaf, veningarstø›an hjá hoyvíkingunum ikki er nóg gó› í løtuni.

– Vit eru ov fáir til venjingarnar, og hetta sæst eisini aftur í dystum, tí vit fáa ikki vant nóg væl, tá ta› bert eru einir seks ella sjey, sum møta regluliga.

– Kanska er ta› eisini ein trupulleiki, at venjingartímar okkar liggja so illa fyri. Tvær fer›ir um vikuna venja vit frá klokkan níggju til ellivu um kvøldi›, og tá kann ta› ofta vera trupult. Møguliga ver›ur hetta betri, tá vit hava fingi› eina ítróttahøll í Hoyvík.

Hóast truplu umstø›urnar tapi› sunnukvøldi›, so er Olaf tó á ongan hátt fallin í fátt.

– Vit ætla okkum so avgjørt ikki gevast vi› at strí›ast. Munurin upp er enn ikki serliga stórur, og so skalt tú eisini minnast til, at vit í veruleikanum bert spæla um eitt stig hvørja fer›, sigur Olaf at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Tjaldur: Sverri Justinussen 9, Mortan Hansen 5, Svein í Hei›unum 4, Jens Martin Knudsen 4(2), Zoran Sarcevic 3
H71: Halgir Dahl Olesen 9(3), Rolf Mouritsen 4, Anfinn N. Debes 4(1), Hallur Danielsen 2, Johnny Djurhuus 1, Rene Dahl Olesen 1
Brotskøst: Tjaldur 5, H71 6
Úvísingar: Tjaldur 6, H71 4
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen